gult cyan magenta svart

Listin bókførd

MYNDLIST - Vit kunnu siga, at føroysk listafólk eru konservativ av lyndi, sum føroyingar kanska eru yvirhøvur. Men hetta n‡tist ikki at vera av tí illa. Hetta er ein spurningur um hugbur›, ikki um gó›sku, sigur Bár›ur Jákupsson, nú forlagi› Sprotin gevur út stórbæru bókina »Myndlist í Føroyum«. - Me›an mótar og n‡ggir trendar stø›ugt stinga seg upp og hvørva aftur, arbei›a føroysk listafólk eftir sínum høvdi

Bár›ur Jákupsson f. 1943 er útbúgvin lærari úr Hjørring 1969 og hevur gingi› á Kunstakademiets Malerskole í Keypmannahavn 1970-72. Eftir at hava veri› lærari á Háskúlanum í eitt 6 ára skei›, gjørdist Bár›ur í 1978 lei›ari fyri Listaskálanum og sí›ani 1989 savnslei›ari á Listasavni Føroya. Bár›ur hevur myndskr‡tt hópin av bókum, serliga barnabøur og bøkur til skúlabrúks. N‡ggja bókin "Myndlist í Føroyum" (Sprotin 2000) er tri›ja stóra myndlistabókin hann grei›ir úr hondum. Hinar bá›ar eru "Mikines" á føroyskum og donskum (Bókagar›ur 1990) og "Tomas Arge" (Listasavn Føroya 1998). Bár›ur fekk í 1991 bókmentavir›isløn M. A. Jacobsens og sama ári› Arbejdslegat frá Statens Kunstfond. Bár›ur Jákupsson er eisini frásøguma›ur, nú Sjónvarp Føroya er fari› undir at l‡sa føroysku myndlistasøguna.

Birgir Kruse

Tillukku vi› bókini. Hví eina føroyska myndlistasøgu?

Takk fyri ta›. Søgan um føroyska myndlist er ongantí› skriva›, og eg haldi tørv vera á henni. Eg eri ikki søguma›ur og ikki kønur í søguvísindum, men áhugin fyri søgu er sera stórur. Í 16 ár starva›ist eg á Føroya Fornminnissavni og ritstjorna›i tí›arritinum Mondli, skriva›i eisini mangar greinir í bla›num, so eg kann siga, at eg havi fingist vi› søguligt tilfar í mong ár.

Hvat hevur veri› grundsjónarmi›i›?

Grundsjónarmi›i› er, at listasøgan er ein táttur ímillum a›rar í Føroya søgu. Myndlistin kemur til Føroya um aldamóti› sum landslagslist. Í sambandi vi›, at tjó›skaparrørslan vakti ein n‡ggjan, á›ur ókendan, ans fyri fø›ilandinum og landslagnum, gjørdist landslagi› um hetta mundi› listarligt tema og myndevni. Fyrst i skaldskapi — fosturlandssongunum, men er ta› nøkur listagrein, i› kann l‡sa náttúruna, landslagi›, so er ta› ey›vita› myndlistin.

Hvussu hevur tú savna› tilfari›?

Eg havi í mong ár skriva› ein hóp av greinum um føroyska myndlist og um listafólk — til bøkur og tí›arrit, myndaskráir, antologiir, leksika o.a. Eg skriva›i eisini bøkurnar um Mikines og Tummas Arge. Í tí sambandi havi eg funni› fram uppl‡singar av ymsum slag. Ta› var náttúrligt, at hugsanin kom fram um at savna alt hetta tilfar saman í eina heild. Eg vil siga, at hendan bókin partvís er ein samanskriving av tekstum, eg havi gjørt ígjøgnum árini. Men sjálvsagt er ta› mesta n‡skriva› júst til hesa bókina.

Ert tú sjálvur vi› í bókini?

Ja, men tann partin hevur listaummælarin Peter Michael Hornung skriva› eftir áheitan frá forleggjaranum Erik Fey á danska forlagnum Atlantia. Ta› var hann, Erik Fey, sum heitti á meg í 1998 at skriva eina føroyska listasøgu. Nú er hon so veruleiki og takka veri› Jonhardi Mikkelsen á Sprotanum, og tí megnararbei›i, hann hevur gjørt, hava vit nú eisini eina føroyska útgávu.

At endurgeva myndlist á rættan hátt á prenti, er trupult. Hvussu hevur tú loyst ta›? Og hvussu hevur ta› eydnast?

At endurgeva myndlist á prenti er altí› trupult. Men prentsmi›jan Jelling Bogtrykkeri er gitin fyri at gera sera gó›ar listabøkur. Gó›skan er so gó›, sum hon kann vera. Sum fleiri helst vita var ta› har, Palli Gregoriussen prenta›i sínar bøkur um føroyskar kirkjur, og mín bók um Tummas Arge var› eisini prenta› har. Eg var› heilt ovfarin, tá i› eg sá, hvussu gó›ar litmyndirnar vór›u í teirri bókini — tær kunnu ikki gerast betur. Ta› er sostatt ígjøgnum Palla, eg fann hesa sera gó›u prentsmi›ju. Eg var sjálvur á prentsmi›juni í fjúrtan dagar og arbeiddi vi› umbróting og lay-out.

Hvar stendur føroysk list ídag, samanborin vi› lond uttan um okkum?

Føroysk myndlist er partur av heimslistini. Eins og øll nor›urlendsk myndlist er hon hon serliga ávirka› av n‡brotinum í Fraklandi, i› byrja›i tí›liga í øldini. Men tann nor›urlendska modernisman mi›skei›is í tjúgindu øld fekk eitt egi› ekspressionistiskt andlit, sum føroysk myndlistafólk hava tiki› til sín. Ta› ey›kennir listafólk okkara yvirhøvur, at tey trey›ugt taka eftir n‡ggjum rákum. Tey standa sjáldan fyri nøkrum n‡broti og hava lítlan áhuga fyri avantgardetrendum. Minimalisma, popplist, konsept-list, land-art o.a.m. fer framvi›, uttan at nakar letur vi› seg koma herheima. Sjálvt ikki surrealisman, i› gjørdi vart vi› seg um flest øll lond, kom nakrantí› rættiliga upp á land her. Vit kunnu siga, at føroysk listafólk eru konservativ av lyndi — sum føroyingar kanska eru yvirhøvur? Men hetta n‡tist ikki at vera av tí illa. Hetta er ein spurningur um hugbur›, ikki um gó›sku. Me›an mótar og n‡ggir trendar stø›ugt stinga seg upp og hvørva aftur, arbei›a føroysk listafólk eftir sínum høvdi. Og kanska er ta› í roynd og veru ta›, i› er mest áhugavert — klára vit at vera føroyingar? Hava vit naka› at bjó›a umheiminum? Vit síggja, at tá i› føroyingar s‡na fram uttanlands, so hava ummælarar á or›i, at føroysk myndlist hevur sítt egna sermerkta andlit, og at hon er áhugaverd, føroyska myndlistin. Vit hava í mun til fólkatali› fleiri sera gó› myndlistafólk, i› fáa bestu ummæli og ver›a umbo›a› í t‡›andi listasøvnum. Men a›rir ummælarar hava á or›i, at føroysk list fylgir ikki mótanum. Og ta› hava teir rætt í.

Vit kunnu tala um ein føroyskan "skúla" upp á gott og ilt. Í hesum høvu›sstreymi eru sum vera man fleiri epigonar — eftiraparar og eltarar, i› royna at mála sum fyrimyndirnar (eru tær nevndar, eru tær kendar) men hava ilt vi› at fóta sær og finna sína egnu lei›. Hetta er eitt l‡ti, i› vit kunnu ilskast um. Og vit eiga at hava í huga tann vanda, at hesin føroyski "skúli" kann stívna í vanabundnari manierismu. Tó — vit hava so miki› fleiri dømi um listafólk, i› eru trúgv ímóti listarinnar kalli.

Mangan ver›ur sagt, at her er einki mentunarligt ella listarligt kjak. Hvat heldur tú? Bæ›i sum listama›ur og rithøvundur?

Eitt mentunarligt og listarligt kjak hev›i kunna› sett ljós á ta›, eg júst nevndi, um at gloyma listarinnar sanna mál og mi›, og í sta›in reka vi› høvu›sstreyminum og mála leskilig litføgur verk, i› konur vi› violettum hári keypa at heingja á brósti› í gó›ustovu, tí litirnir standa so væl til sofuna. Tíverri hava okkara fjølmi›lar ikki orku til at seta í starv ella sams‡na rættiligar ummælarar og listafrø›ingar, i› kundu hildi› einum kritikki í gongd. Hetta er kanska skiljandi í okkara smáu vi›urskiftum, ta› veit eg ikki. Men spell er ta›, tí ilt er at vera kritikk fyri uttan. Nú er ta› so, at flestu listafólk okkara s‡na fram í ø›rum londum, har kunnu tey ver›a viga›, og avrik teirra ver›a mangan ummæld uttanlands. Ta› hevur stóran t‡dning, men spell er, at listafólk mega leita av landinum til tess at fáa aftirsvar - respons.

Tosa› hevur veri› um ein listaskúla. Eiga vit at útbúgva okkara listafólk herheima, ella er ta› júst ein vinningur, at koma burtur í onnur lond?

Í kvøldskúlanum í Havn er gó› undirvísing í løtuni í grafikki. Ein føroyskur listaskúli átti at veri› á byrjanarstigi og mi›stigi, i› kundi fyrireika› næmingar til hægri akademiútbúgving og lagt teimum lag á ymiska tøkni, eisini n‡ggja IT-tøkni. Men annars haldi eg — og fleiri vi› mær, hugsi eg — at ta› er gott og gagnligt, at okkara ungu listafólk koma burtur og taka til sín so nógv sum møguligt av tí, i› rørist í heimslistini.

Danskir ummælarar hava onkuntí› sammet vir›islønta Ingálv av Reyni og Per Kirkeby. Hvat heldur tú um ta›?

Danskir ummælarar yvirhøvur seta Ingálv av Reyni sera høgt. Ingálvur hevur fingi› størstu listarligu hei›ursmerki, i› fáast kunnu í Danmark, og hann ver›ur taldur ímillum fremstu listafólk í ríkinum. Og mánakvøldi› fekk hann eisini Mentanarvir›isløn Landsins handa›a frá landsst‡rismanninum í mentamálum. Ein stór løta. Eg hugsi ta› var ummælarin á Jyllands-Posten, Bent Irve, i› skriva›i, at ta› var heilt burturvi› at gera so nógv burtur úr Kirkeby, tí Ingálvur var nógv størri listama›ur. Men annars haldi eg ikki, at ta› ber til at tosa um list, sum var ta› fótbóltur. Í listini eiga vit at halda okkum burtur frá gull-silvur-bronsu hugsanini.

Henda n‡ggja listabókin er ódnartak, eisini fíggjarliga. Hvussu er bókin fíggja›?

Ta› var ikki bara at siga ta›, at hugsa um eina listabók, tí ta› er sera kostna›armiki› at geva út eitt slíkt verk vi› mongum litmyndum. At geva myndlistasøgu út uttan myndir gevur onga meining. Men so var eg so heppin, at eitt danskt bókaforlag Atlantia seg›i seg vilja geva út eina bók um føroyska myndlist og ba› meg skriva hana. Og eg var sum vera man til rei›ar. Forlagi› Sprotin var áhuga› í at standa fyri einari føroyskari útgávu, og tí kemur hon eisini á føroyskum. Naka› av stu›uli fekst frá grunnum og fyritøkum. Eg eri sera takksamur fyri, at hetta kundi fáast í lag.

Um eg spyrji teg persónliga, hvør er so tín bakgrund at skriva tílíka bók?

Mín bakgrund fyri at skriva bókina er, at eg havi havt áhuga fyri myndlist sí›an eg var smádrongur. Eg havi lisi› ein hóp um myndlist og eisini fingi› undirvísing í sambandi vi› útbúgving á málaraskúlanum á listaakademinum í Keypmannahavn.

Sum útbúgvin lærari, hvat heldur tú um list og skúlasamstarv? Kann naka› gerast her, ella er nóg miki›?

Í Listasavninum kenna vit ta› sum ein stóran vansa, at vit ikki hava manning til at kunna hava savnsundirvísing. Skúlaflokkar vilja fegnir vitja savni›, men vit fáa ikki veitt ta tænastu, i› eitt savn eigur at gera í dag. Okkara stóra ynski er at seta ein savnslærara, i› kann taka ímóti skúlaflokkum og seta skúlavitjanir inn í undirvísingarsamanhang. Ta› er okkara ynski. Ein savnslærari.

Takk fyri práti› og gó›a eydnu vi› bókin og virkseminum í Listaskálanum framyvir.



Okkara uppskot um ársins bók:
"Myndlist í Føroyum"
Bár›ur Jákupsson
Sprotin 2000
165 bls.,
420,00 kr.

A›rar bøkur, sum Bár›ur Jákupsson hevur skriva› um føroyska list:
"Tommy Arge" (Listasavn Føroya 1998)
"Mikines" (Bókagar›ur 1990)

Úrval av bókum um listamannin Ingálv av Reyni:

"Rød Regn" Finn Thermann Frederiksen (Randers Kunstmuseum 1998)

"Ingálvur av Reyni" Jahn Otto Johansen & Bent Irve (Nor›urlandahúsi› 1993)

"Ingálvur av Reyni" Gunnar Hoydal (Mentunargrunnur Studentafelagsins 1989)

Í sambandi vi› 80 ára dag Ingálvs, kemur stóra "svarta" bókin hjá Mentunargrunni Studentarfelagsins út aftur undir kønu lei›slu Gunnar Hoydals og Jógvan Isaksens. Samstundis fer Sjónvarp Føroya eisini at vísa filmin "Svartur sannleiki" sum Dánjal Højgaard og Hans Petur Hansen so meistarliga gjørdu um Ingálv av Reyni.

Frams‡ning

Hin 25. november ver›ur lati› upp fyri n‡ggjari frams‡ning í Listasavni Føroya. Talan er um n‡ggj avrik hjá Føroya yngsta listamanni, sum Bár›ur Jákupsson málbær seg í Nor›urlandahúsinum mánakvøldi›, tá Ingálvur av Reyni fekk Mentanarvir›isløn Landsins. S‡ndir ver›a fram umlei› 20 oljumálningar og 30 vatnlitsmyndir hjá Ingálvi.